

Mærsk Innovator hevur arbeiði í 16 mánaðir. Mynd: Maersk Drilling

# Fimm nýggjar avtalur hjá Maersk Drilling

**Jógvan Hugo Gardar**

17.08.2015 - 09:40

Oljan.fo

Hóast øll frálandavinnan hevur tað sera trupult, nú oljuprísurin er munandi lægri enn teyy flestu feløgini hava lagt til grund fyri sín rakstur, so hevur Maersk Drilling undirskrivað fimm nýggjar avtalur í 2015.

Á egnu heimasíðu skrivar fyritøkan at tey hava lagt dent á at hava virksemi til boripallarnar og tryggja at arbeiði er til starvsfólkini, samstundis sum kosnavarstøði skal lækkast fyri at tillaga seg gongdini á oljumarknaðinum.

Oljuprísurin ger at nógvar broytingar eru á veg í oljuvinnuni. Hvønn einasta dag hoyra vit um broytingar, og sambært greinarunum hjá Rystad Energy, so eru ætlanir hjá oljufeløgum fyri meir enn 100 milliardir dollarar útsett ella steðgaðar.

Maersk Drilling er fyri tíð síðani farið undir at tillaga framleiðsluna, umframt at viðlíkahald verður gjøgnumført.

Higartil í ár hevur Maersk Drilling undirskrivað fimm avtalur:
* Maersk Voyager hevur fingið eina langtíðaravtalu.
* Maersk Venturer hevur fingið eina stutttíðaravtalu.
* Heydar Aliyev hevur fingið eina fimm-ára-avtalu.
* Mærsk Innovator hevur fingið eina 16-mánaðar-avtalu.
* Mærsk Giant hevur júst fingið eina nýggja avtalu.